# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Tað er ábyrgdarleyst av Kongressini at halda aftur pengum til okkara hermenn í kríggi*

*Bush, forseti*

# Steingja allar tunlarnar




Norsku vegamyndugleikarnir fingu ein hvøkk jóladag í fjør, tá ein partur av loftinum í Hanekleiv-tunlinum rapaði. Síðani hava myndugleikarnir kannað allar tunlarnar har um vegir, og niðurstøðan er, at teir ewru alt ov illa tryggjaðir. Tí eru ikki færri enn sjey tunlar stongdir nú, so teir kunnu gerast tryggari. Tunlarnir eru millum teir nýggjastu í Noregi, og dagliga koyra umleið 17.000 bilar ígjøgnum teir.

# Bush til reiðar at tosa við demokratarnar

**Men talan verður ikki um beinleiðis samráðingar um ta politisku kósina, sigur forsetin**

George W. Bush, forseti, sigur seg nú vera sinnaðan at tosa við Kongressina fyri at loysa trætuna um, nær USA skal fara undir at taka sínar hermenn úr Irak.

Senatið hevur sagt, at teir seinastu hermenninir skulu úr Irak innan 31. mai næsta ár, og Umboðsmannatingið hevur sett 1. september næsta ár sum seinastu freist. Bush hevur harafturímóti fleiri ferðir gjørt greitt, at hann fer undir ongum umstøðum at áseta nakran dag fyri, nær USA fer undir at taka sínar hermenn úr Irak, ella nær teir seinastu fara haðani.

Bush hevur biðið Kongressina um 100 mia. dollarar afturat til kríggið í Irak og Afghanistan. Kongressin hevur játtað honum pengarnar, men við teirri treyt, at afturtøkan verður sett á dagsskránna.

Soleiðis hevur málið staðið rimmarfast, men í einari røðu fyri gomlum hermonnum í gjárkvøldið gloppaði forsetin dyrnar fyri orðaskifti við Kongressina um málið.

– Tíðin er komin til at loysa uppgávuna, og tí bjóði eg umboðum fyri báðar teir politisku flokkarnar í Hvítu Húsini at tosa við meg, segði Bush í røðuni. Hann duldi tó ikki fyri, at hann er sera misnøgdur við støðuna hjá meirilutanum í Kongressini. Sambært forsetanum renna tey undan ábyrgd og sleppa hermonnunum upp á fjall, nú landið er í kríggi.



*Eftir togan aftur og fram er George W. Bush nú sinnaður at tosa við Kongressina um Irak-kríggið.*

## STUTT SAGT

### Gasslond gera vart við seg

Felagsskapurin hjá londunum, sum útflyta gass, hevur á fundi í Qatar samtykt at menna samstarvið landanna millum og at styrkja sjálvan felagsskapin. Londini, sum útflyta gass, hava ikki hildið fund tey bæði seinastu árini, men nú er ætlanin, at felagsskapurin skal halda regluligar fundir eins á oljuútflytaralondini í OPEC. Á fundinum í Qatar samtyktu londini at seta ein arbeiðsbólk til at gera eitt uppskot um, hvussu felagsskapurin skal skipast, og hvussu felagsskapurin skal halda eyga við framleiðsluni hjá teimum einstøku londunum. Russland er heimsins størsta gassútflytaraland, og næsti fundur hjá felagsskapinum verður í Moskva næsta ár.

### Sarkozy á odda

Hevði forsetaval verið í Fraklandi í dag, er tað lítið at ivast í, at eftirmaðurin hjá Jacques Chirac hevði itið Nicolas Sarkozy. Ein meiningakanning vísir, at heili 67 prosent av teimum spurdu rokna við, at tað konservativa forsetavalevnið fer at vinna valið seinni í mánaðinum. Bara 16 prosent vænta, at sosialisturin Ségolene Royal fer at vinna, og hini bæði valevnini verða søgd at hava uppafturminni møguleikar. Fransmenn skulu velja forseta tann 22. apríl, og fær einki valevni meiriluta tá, verður umval millum tey bæði, sum fáa mest í fyrra umfari.

### Møsn úr Iran

Frakland og Avstralia hava sagt seg ivast í, um nakað hald var í tí, tá iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, nú um dagarnar segði, at Iran hevur av álvara sett ferð á arbeiðið at ríka uran. Sjálvt Russland, sum vanliga hevur gott samband við Iran, tekur ikki orðini hjá forsetanum fyri fult. Ein talsmaður hjá uttanríkisráðnum í Moskva segði í gjár, at orðini hjá iranska forsetanum høvdu einki við veruleikan at gera. Hatta er tað vanliga politiska orðaspælið, segði talsmaðurin.